

***Leikandi kvinnurnar í ársins ólavsøkukabarett eru:** Durita Dahl Andreassen, Marita Svartá, Barbara Hentze í Stórustovu, Rakul Thomsen, Mariann Hansen, Tjóðhild Patursson og Lisa Randi í Dali (vantar á myndini). **Tónleikarar í Ólavsøkukabarettini 2010 eru:** Jan Jensen, Hilmar Kass Jacobsen, Bjartur Dal-Christiansen, Andreas Dalsgaard*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Kabarettin prikar vanliga føroyingin

**Fyri tveimum árum síðani tóku ungar kvinnur sær av Ólavsøkukabarettini. Tær fara í ár aftur á pallin, enn prikandi, provokerandi og stuttligar, og ikki minst siga tær seg vera tvey ár betri og búnari**

**Dagfinn Olsen**

Tað er gott lag í Sjónleikarhúsinum í Havn hendan dagin fyrst í juli, tá vit vitja innar. Farteldur og kaffi er á borðinum, og kring borðið sita seks ungar kvinnur. Ungar eru tær, hóast tvey ár eldri, enn tá tær fyri tveimum árum síðani eisini tóku sær av kabarettini. Hetta var tá fyrstu ferð at einans kvinnur stóðu á pallinum við Ólavsøkukabarettini, og fleiri áskoðarar stúrdu fyri úrslitinum. Hjá flestu teirra var óttin tó ógrundaður, tí allar sýningarnar vóru útseldar og tær fingu salin at kóka kvøld eftir kvøld.

- Vit hava roynt hetta áður, men tað ger ikki avbjóðingina minni. Krøvini frá áskoðaranum eru høg, og tey vilja vit liva upp til. Vit eru blivnar tvey ár eldri, og tað djarvari. Vit hava sjálvsagt eisini nakað at liva upp til, bæði við kabarettini í 2008, og okkara persónligu krøvum um nýskapan, siga kabarettkvinnurnar.

Í fjør var ongin kabarett á Ólavsøku.

- Eingin kabarettbólkur helt seg framat á Ólavsøku í fjør, og sjálvar høvdu vit avgjørt ikki at gera hana aftur longu árið eftir. Men vit hildu tað vera spell at eingin kabarett var í fjør, so tá vit hittust til eina veitslu á jólum avgjørdu vit, at vit skuldu seta kabarettina upp aftur nú í summar, siga kabarettkvinnurnar.

Tað, sum sermerkir kabarettina í ár er sangur og dansur, og tann góði, gamli cabaré stílurin kemur eisini til sín rætt. Annars verður væl blandað millum ymsu leikstílarnar og kreativiteturin blómar.

- Vit blanda alt eitt sindur. Føroyingar sum heild, politikarar og persónlig prik. Jú, ávísir persónar verða eisini settir á pall.

## Stuttligir føroyingar

- Vit hava nógv tilfar at arbeiða við. Drotningavitjan, stór hasjplantaga á Norðskála, bummgjald til Havnar, Immi og Elton og mangt, mangt annað. Tá ein hevur verið av landinum í eina tíð, kann ein lættliga síggja Føroyar og føroyingar við øðrvísi eygum. Føroyingar eru sera stuttligir. Serliga náttúran í føroyinginum er stuttlig, er ein meting hjá kvinnunum aftanfyri ólavsøkukabarettina í ár.

- Vit hava vunnið nógv, um áskoðarin kennir seg aftur í eini ávísari støðu og hugsar: "Hatta kundi verið eg ella heima hjá okkum." Sum sagt, so tora vit nú betur at vísa okkara freku síður, enn vit gjørdu seinast. Vit hava fingið at vita, at í nøkrum førum kundu vit verið djarvari. Men spurningurin er eisini, hvat áskoðarafjøldin tolir. Hóast vit vilja prika, so vilja vit eisini hava áskoðararnar við okkum, siga kabarettkvinnurnar.

- Vit eru komnar langt við skrivingini og eru farnar á pallin. Á pallinum síggja vit hvat skal vrakast og hvat skal pussast. Við tí sjónleikatratitión, vit hava, eru vit greiðar yvir at vit kunnu skapa góðsku. Vit eru stuttligar, men eisini kritiskar, siga ungu damurnar í Sjónleikarhúsinum.

- Tað kann verða ringt at vita undir venjing hvat riggar og hvat ikki riggar, tá ein áskoðarafjøld ikki er til staðar. Vit minnast afturá ymisk leikbrot, sum vóru strikað av leikskránni seinast, men síðani tikin uppaftur. Tað er henda gongdin, sum vit eru í nú. Nú verður sáldað frá. Men ein reyðan tráð vilja vit hava, samstundis sum vit royna at fevna so víða sum gjørligt, ljóðar úr Sjónleikarhúsinum.

Tá vit royndu at fregnast, hvat serliga fer at merkja kabarettina í ár, eru tær varnar við at lata ov nógv leka út.

- Politikarar fáa sítt, men vit leggja sjálvsagt eftir Kringvarpinum, tí har hava tey megnað at spent bein fyri sær sjálvum. Og nakrir av persónunum ella figurunum frá seinastu kabarettini eru við aftur í ár, siga kvinnurnar í Sjónleikarhúsinum.

- Tað eru tú og eg, føroyingar sum heild, sum standa fyri skotum, siga kabarettkvinnurnar.

dagfinn@sosialurin.fo

**Brot úr byrjunarsangi: "Oooohhhh Føroyar eg elski teg, men Ohhhh tú øsir meg Og alt títt fjas..."**